tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 27.05.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, ~~Kristina Roest~~, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Eyð Eidesgaard, møtt fyri Kristinu Roest

Ikki møtt: Kristina Roest, fráboðað

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| Málsyvirlit | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 30/21 | 21/00001-10 | Dagføringar av kommunustýrisskipanini |
| 31/21 | 21/00400-2 | Dagføringar í starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar kommunu |
| 32/21 | 21/00084-4 | Liðuggerð av súpanarvík - verkætlan |
| 33/21 | 21/00027-5 | Dugni í Suðuroy |
| 34/21 | 21/00392-2 | Húsið við Stórá -ungdómshús um vikuskiftið |
| 35/21 | 21/00414-2 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til næmingar 2021 |
| 36/21 | 21/00421-2 | Val til Eldraráðið fyri BHS valskeiði 2021-2024 |
| 37/21 | 21/00428-2 | Skúlagarðar -dagføringar 2021 av leikum v.m |
| 38/21 | 21/00433-1 | Tvøroyrar skúli -Keyp av talvum og teldum til Tvøroyrar skúla |
| 39/21 | 21/00022-13 | Umsókn um góðkenning av íbúðunum í bygninginum á matr. nr. 46c - herundir frávik frá byggisamtyktini |
| 40/21 | 21/00149-2 | Mýrifípan -Barnaansing í hálvari tíð |
| 41/21 | 21/00078-1 | Mentanartiltøk 2021 |
| 42/21 | 21/00449-1 | Ung í arbeiði 2021 |
| 43/21 | 20/00193-7 | Uppskot um marknaumskipan - Sjógøta 56 - Jóhan Nónstein |

| **Til kunningar** | | |
|---|---|---|
| | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| | 21/00329-5 | Kunning -skriv frá kommunufelagnum til UVMR um val av stýrislimi til BHS |
| | 21/00413-2 | Ymisk kunning til býráði |

Einmælt samtykt at Eyð Eidesgaard tekur sæti á býráðsfundinum 27.05.2021.

Kristin Michelsen, lesur upp skránna og spyr um viðmerking er til hesa. Ongin viðmerking.

**Til støðutakan30/21**
**21/00001-10 Dagføringar av kommunustýrisskipanini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2021 | 21/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 19/21 |
| 3 Býráðið | 26.04.2021 | 24/21 |
| 4 Býráðið | 27.05.2021 | 30/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.03.2021**
Tilmælið um dagføringar av kommunustýrisskipan galdandi fyri Tvøroyrar kommunu

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018

**Býráðið 25. marts 2021:**
Jónley J. Bech mælir til at málið verður beint í fíggjarnevndina.
**Einmælt samtykt**

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2021:**
Jónleyg J. Bech mælir til at tikið verður undir við uppskotinum og mælir til at kirkjugarðar vera málsøkið hoyrandi til Mentanarnevndini og at almenn spælipláss og sparkivallir verða málsøkir hoyrandi til Trivnaðar- og umhvørvisnevndina.
Málið verður beint í býráði

**Býráðið 26. apríl 2021:**
Anita Vibergsdóttir leggur fram broytingaruppskot til tilmælið frá fíggjarnevndini, at kirkjugarðar verða málsøkið hjá Tekniskudeild og at spælipláss vera málsøkið hjá Trivnaðar og umhvørvisnevndini.
Einmælt samtykt.
Soleiðis er kommunustýrisskipan einmælt samtykt til fyrstu viðgerð

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð. Harvið er málið endaligt samtykt.

**31/21**
**21/00400-2 Dagføringar í starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 20/21 |
| 2 Býráðið | 26.04.2021 | 25/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 31/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
1 viðgerð av uppskoti til broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu.

Mælt verður til at dagføra starvsfólkareglugerðina hjá Tvøroyrar kommunu serliga fyri at tillaga setanarheimildina til at vera fyrisitingarlig heldur enn politisk, og fremja dagføringar samb. nýggjar lóggávur.

Broytingin er serliga viðv.:

- Setanarheimild, og setanarbólkur.
- Persónsdátuverndarlóg
- Barnburðafarloyvið
- Royking og rúsevnum.
- Fráfaringaraldur

Aðrar smærri broytingar í orðingum í starvsfólkaskipanini verða eisini gjørdar.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2021:**
Jónleyg J. Bech og Anita Vibergsdóttir mæla til at tikið verður undir við uppskotinum dagft. 20.04.2021.
Bjarni Hammer mælir til at hildið verður fram við verandi starvsfólkaskipan 11.04.2019.
Málið verður beint í býráði

**Býráðið 26. apríl 2021:**
Atkvøtt var um uppskot frá minnilutanum í fíggjarnevndini Bjarna Hammer, at halda við verandi starvsfólkaskipan 11.04.2019
Fyri ongin
Ímóti Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen
Harvið er uppskotið hjá minnilutanum í fíggjarnevndini fallið
Atkvøtt var um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini Jónleyg J. Bech og Anitu Vibergsdóttir.
Fyri Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen
Ímóti ongin
Harvið er tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini samtykt til fyrstu viðgerð

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð tilmælið hjá meirilutanum hjá fíggjarnevndini. Harvið er málið endaligt samtykt.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**32/21**
**21/00084-4 Liðuggerð av súpanarvík - verkætlan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 08.03.2021 | 9/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 19.04.2021 | 12/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 21/21 |
| 4 Býráðið | 26.04.2021 | 26/21 |
| 5 Býráðið | 27.05.2021 | 32/21 |

**Málslýsing:**
**Teknisur leiðari 05-03-2021:**
Vísandi til seinasta fundin í Vinnu og – havnanevndini tann 08.02.2021 bleiv samtykt at arbeiða víðari við uppskotinum, at Súpanarvíkin skal gerast liðug. Í samband við hetta hevur tekniska deild hjá Tvøroyrar kommunu saman við HMP Consult gjørt uppskot sum tekur støði í verandi umstøðum. Í prosjektinum eru tikin atlit til at fólk og borgari kunnu trygt uppihalda sær og hugna sær í økinum meðan arbeiði fer fram á havnini og kring økinum.
Prosjektið er deilt í tríggjar partar

- 1 økið við bingju havnina
- 2 økið á norður síðuni
- 3 samband millum súpanarvíkina og miðbýin/ doktarahúsini

Fyri at uppihalda í økinum skal kunna fara fram er umráðandi at vegir og farleiðir verða gjørdar til tungu ferðsluna. Í hesum sambandi eru gjørdar kanningar við sleipikurvum sum verður greitt nærri frá á fundinum.
Atløgubryggjan er, í tveimum hæddum fyri at taka atlit til ymisku báta støddirnar, hetta verður eisini at greitt frá á fundinum.
Atlit eru tikin til at alt arbeiði verður gjørt frá landi, tá mett verður at hetta er tann bíligasta loysnin.
Uppskot og kostnaðar meting er gjørt fyri punkt 1 og 2. Tað er ikki arbeitt við punkt 3 enn. Upptøka og reinsan av botninum er ikki gjørd og partur av metingini.
Fyri at gera byggistig 1 er metingin at hetta arbeiði kann gerast fyri kr. 4.500.000,-. Sí viðheft skjøl fyri útgreining.

**Vinnu- og havnanevndin 08. marts 2021:**
Nevndin er kunnað um verkætlina. Nevndin mælir til at spyrja veitara um møguligt er at fáa ein lægri kostnað.

**Málslýsing 16. apríl 2021:**

Munnlig kunning um tilgongdina.

**Vinnu- og havnanevndin 19. april 2021:**
Alternativ loysn um liðuggerð av Súpanarvíkini er innkomin frá MTV-Byggivirkið.
Anita Vibergsdótttir skjýtur upp at taka undir við uppskotinum frá MTV-byggivirkið og mælir til at tekniska deild innkallar til fyrireikandi fund beinanvegin.
Einmælt samtykt at taka undir við at arbeiða víðari við uppskotinum.

**Tekniski leiðarin 20.04.2021:**
Uppfylgjandi fundur var við Mortan Thormann Vang 19.04.2021, har øll nevndin var biðin um at lutaka. (Møtt vóru Alvi Mortensen, Anita Vibergsdóttir, Bjarni Hammer gav avboð). Viðgjørt var uppskot/tilboð at liðugt gera innasta part/ botnin av Súpanarvíkini.
Uppskot, tilboð og fundarfrásøgn liggja við, nevnd A1, A2 & A3.

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Anita Vibergsdóttir og Linn Augustinussen greiddu frá uppskotinum frá MTV og mæla til, at hetta arbeiði byggistig 1, verður at byrja beinanveg, samb. kostnaðarmeting A3 frá MTV dagf. 18.04.2021. á kr. 685.000,- Tilmælið er at timburarbeiðið verður gjørt í trýstviðgjørdum timbur. Arbeiði verður játtað av §719. Har avsett eru kr. 400.000,- Írestandi fígging verður veitt við eykajáttan.
Bjarni Hammer viðmerkir, at hann metur ikki at málið er búgvið, og ynskir eina heildarætlan áðrenn byrja verður uppá ger av kaihylinum.
Kristin Michelsen og Jónleyg J. Bech taka undir við tilmælinum hjá Havna- og vinnunnevndini og mæla til at taka av tilboðnum hjá MTV, dagt. 18.04.2021.
Bjarni Hammer atkvøddi blankt.
Málið verður beint í býráði

**Býráðið 26. april 2021:**
Anita Vibergsdóttir mælir til at býráðssamtyktin frá 30. september 2020, um uppskot um liðuggerð av kaihylinum - kaikant í allari Súpanarvík, har arbeiðsbólkur verður settur, sum skal koma til býráðið við einum uppskoti at taka støð til, verður annulera.
Fyri eru, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Alvi Mortensen
Ímóti eru, Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen
Blankt Eyð Eidesgaard
Uppskotið samtykt

Atkvøtt var um meiriluta tilmælið hjá Havna- og vinnunevndini at taka av tilboðnum frá MTV.
Fyri eru, Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Alvi Mortensen
Ímóti eru, Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen
Blankt, Eyð Eidesgaard
Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon atkvøður ímóti tí arbeiði ikki er boðið út
Kristina Roest ynskir viðmerkt, at hon atkvøður ímóti tí arbeiði ikki er boðið út, og tí at býráði hevur aðrar stórar íløgur sum eiga at takast framum.

**Kommunustjórin 24.05.2021**

Onnur viðgerð av eykajáttan til liðuggerð av kaihyli/kaikanti í Súpanarvíkini, samb. tilmælið hjá Vinnu og havnanevndini og samtykt til fyrstu viðgerð av Tvøroyrar Býráð 26. Apríl 2021.
Mælt verður til at eykajáttan verður veitt av innistandandi.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Atkvøtt var um mál
Fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech
Ímóti: Súsanna Bertholdsen
Blankt: Eið Eidesgaard og Bjarni Hammer
Harvið er málið samtykt við arðu viðgerð

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt at hon atkvøður ímóti orsakað av at arbeiði ikki er boði út.

33/21

21/00027-5 Dugni í Suðuroy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 11.05.2021 | 14/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 33/21 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 04.05.2021)**

Dugni hevur avgjørt at seta á stovn deild í Suðuroynni, og hevur í hesum sambandi sett deildarleiðara og starvsfólk í starv.

Kommunustjórin og borgarstjórin hava í hesum sambandi samskift við stjóran á Dugna, og mæla til at starvsfólk hjá Dugna í Suðuroynni fær atgongd til skrivstovu og goymslu hølið hjá Tvøroyrar kommunu fyri at koma í gongd við virksemið.

**Sosiala nevnd 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 27. maj 2021:**
Kristin Michelsen mælir til at Dugni fær innivist hjá Tvøroyrar kommunu fyribils til 31.12.2020. Har eftir verður málið tikið upp til nýggja viðgerð.
Einmælt samtykt.

TVØROYRAR KOMMUNA

**34/21**
**21/00392-2 Húsið við Stórá -ungdómshús um vikuskiftið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 23.04.2021 | 14/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 25/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 34/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 16.04.2021)**
Umsitingin hevur móttikið fyrispurning um loyvið at leiga/lán húsið við Stórá til ungdómshús um vikuskiftið.

Skriva verður í umsóknini, at hugsanin er at hava opið fríggja- og leygarkvøld. Og tiltøkini vera umramt spæl á vøllinum.

- Borðspøl
- Tónleik
- Film
- Kiosk –søla av vørum til ein sámuligan prís.

Tiltøkini verða fyri ung við práti, spølum og hugna í einum rúsfríum umhvørvi.

Umsøkjarin vísir á at vaksin í ymisku ítróttarfeløgunum skiftast um at hava ábyrgd t.d. flogbólturin tekur eitt vikuskifti, fótbólturin eitt, fimleikurin eitt osfr.

Kommunustjórin mælir til at loyva umsøkjarum at skipa fyri tiltøkum fyri ung um vikuskiftið á økinum við Stórá og inni í felagshúsinum, og at hetta verður samskipa við húsavørðin. Raksturin av at reingerða felagshúsið kann økjast av meir nýtsluni, og verður hetta tá fýggja við eykajáttan. –Eisini verður mælt til at hava reglugerð um nýtsluna og atkomuna til økið og felagshúsið, við kunning um hvørjir eru ábyrgdar persónarnar.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 23. april 2021:**
Nevndin hevur einmælt samtykt at taka undir við umsóknini, at loyva ítróttarfeløgnum at lána húsið við Stórá til ungdómshús í vikuskiftinum.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt at loyva ítróttarfeløgum at gera brúk av felagshúsinum við Stórá til ungdómshús, har ein reglugerð verður gjørd ísamráð við húsavørðin og ábyrgdarpersón fyri hvørt felag sær.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Jónleyg J. Bech greiddi frá ætlanini at loyva Ítrottarfeløgum at gera brúk av felagshúsinum við Stórá til ungdómshús.
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini, at loyva hesum, har ein reglugerð verður gjørd ísamráð við húsavørðin og ábyrgdarpersón fyri hvørt felag sær.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**35/21**
**21/00414-2 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til næmingar 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2021 | 31/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 22/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 35/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 03.05.2021)**
Stjórin á Føroya Eftirskúla, hevur sent umsitingini teldubræv við umsókn um stuðul til næmingar á Føroya Eftirskúla, soleiðis at hesir kunna luttaka til ítróttartilboð í kommununi á jøvnum føtum við ungdómar í kommununi.

**Mentanarnevndin 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt at játta næmingunum á Føroya Eftirskúla javnboðis atgongd til ítróttar og mentanartilboð, á jøvnum føtum við ungdómar við bústaði í kommununi. –Máli verður beint í fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt, at næmingar sum koma úr øðrum kommunum og londum og sum ganga á eftirskúla fáa javnbjoðis atgongd til frítíðarkorti

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt

**36/21**
**21/00421-2 Val til Eldraráðið fyri BHS valskeiði 2021-2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 11.05.2021 | 13/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 36/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 05.05.2021)**
Samb. viðtøkunum fyri BHS, Bú og Heimastænastuna í Suðuroy skal Tvøroyrar kommuna velja 2 umboð í Eldraráðið.

Skipa var fyri valið til Eldraráði tann 10. November 2020, samstundis sum val var til kommunustýrið og skúlastýrið. Men vegna vantandi undirtøku at stilla upp í Suðuroynni bleiv avgjørt av leiðsluni í BHS í samráð við kommunalu umsitingina at avlýsa valið.

Málið var umrøtt og kunna í Sosialu nevnd 5. desember 2020, har kommunustjórin greiddi frá, at valið til Eldraráðið var avlýst, og í samráð við leiðsluna í BHS verður avgjørt á styrisfundi í BHS hvussu Eldraráðið skal skipast og hvørji umboð vera í Eldraráðnum.

**Eldraráðið í Suðuroy**

- *Í samsvar við løgtings nr.19 frá 7.apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hava kommunurnar í Suðuroy avgjørt at gera eitt felags eldraráð fyri Suðuroynna og hevur Bú- og Heimatænastan í Suðuroy (BHS), ið er samstarvið hjá eldraøkinum í Suðuroy, ábyrgd av at seta hetta í verk og at hava samskiftið við eldraráðið.*
- *Uppgávan hjá eldraráðnum er at ráðgeva BHS í spurningum, ið hava við eldrapolitikk at gera.*

**Viðtøkur fyri eldraráðið**

**§1 Endamál**

- *Eldraráðið er ráðgevi hjá Bú- og Heimatænastuni (BHS), og er millumlið í samskiftinum millum eldru borgararnar og BHS.*

**§ 4 Eldraráðsins samanseting**

- *Eldraráðið verður samansett eftir sama leisti, sum stýrið fyri BHS:*
  *Vágs og Tvøroyrar kommuna velja 2 limir hvør.*
  *Sumbiar, Porkeris, Hovs, Fámjens og Hvalbiar kommuna velja 1 lim hvør.*
- *Stk. 2*
- *Valskeiðið er 4 ár.*

Stýrið hjá Bú- og Heimatænastuni hevur á fundi 22.04.2021 samtykt at broyta viðtøkurnar hjá Eldraráðnum á tann hátt, at onki val verður til eldraráðið, men at hvør kommuna veldur síni umboð til eldraráðið, ið verður samansett eftir sama leisti, sum stýrið fyri BHS.

Hett merkir, at Vágs- og Tvøroyrar Kommuna velja 2 umboð hvør, meðan Sumbiar-, Porkeris-, Hovs-, Fámjins-, og Hvalbiar kommuna velja 1 umboð hvør.

**Mælt verður til, at Tvøroyrar býráð velur 2 umboð í eldraráðið eftir lutfalsvallháttinum.**

**Sosiala nevnd 11. maj 2021:**
Anita Vibergsdóttir mælir til at velja Mariannu Jacobsen og Finnleif Guttesen sum fastar limir í eldraráðið fyri BHS. –Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt at velja Mariannu Jacobsen og Finnleif Guttesen sum fastar limir í eldraráðið fyri BHS

**37/21**
**21/00428-2 Skúlagarðar -dagføringar 2021 av leikum v.m**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2021 | 33/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 34/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 37/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 07.05.2021)**
Tekniskadeild hevur arbeitt við uppskoti til dagføring av skúlagarðinum í Trongisvági og á Tvøroyri. Avsett eru kr. 250.000,- til dagføringar á FÆ2021.

**Mentanarnevndin 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt at dagføra skúlgarðin við Tvøroyrar skúla fyri kr. 250.000,- og skúlagarðin í Trongisvágs skúla fyri kr. 250.000,-, og keypið av leikum verður í samráð við mentanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt at samlaða játtanin á FÆ20 á kr. 500.000,- til dagføring av báðum skúlagarðinum. Tekniska deild umsitur játtanina í samráð við skúlaleiðsluna

**38/21**
**21/00433-1 Tvøroyrar skúli -Keyp av talvum og teldum til Tvøroyrar skúla**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2021 | 5/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 29/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 38/21 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 05.05.2021)**
Tvøroyrar skúli hevur játtan §411 til keyp av talvum og teldum í innvernandi fíggjarári uppá kr. 228.000,-

Skúlastjórin hevur innheinta tilboð uppá keyp av talvum og teldum til Tvøroyrar skúla fyri tilsamans kr. 222.476,-, sum er tikin til eftirtektar.

**Mentanarnevndin 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt

## 39/21

## 21/00022-13 Umsókn um góðkenning av íbúðunum í bygninginum á matr. nr. 46c - herundir frávik frá byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 31/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 39/21 |

**Málslýsing:**
MTV hevur bygt tríggjar íbúðir í vinnubygninginum á matr. nr. 46c í Trongisvági.

Byggisamtyktin hjá Tvøroyrar Kommunu sigur í § **28: Øki C: Vinnuøki**

1) Økið verður lagt av til vinnuvirkir, t.e. heilsølur, goymslur, verkstaðir og ídnað (herundir aling), til tænastuvirksemi í samband við vinnuvirkir og til parkeringsøkir o.t.
   Byggimyndugleikin kann geva loyvi til at innrætta eina íbúð til virkiseigara ella starvsfólk.

Tekniska Deild metir, at tað er ein fyrimunur í mun til útsjónd av bygninginum, at har eru íbúðir á norðursíðuni.

Innrætting av fleiri íbúðum í vinnubygningum, sum ikki er ætlað til bústað hjá eigaranum og/ ella starvfólkum, er ikki í tráð við byggisamtyktini, og krevur tískil eitt frávik, sum skal staðfestast í býráðnum.
Mælt verður til, at geva eitt undantaksloyvi í hesum førinum.

**Tekniska nevnd 10. maj 2021:**
Nevndin tekur undir við at frávik skal latast í mun til at loyva íbúðum og verður málið beint í býráði.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Atkvøtt var um uppskotið
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer
Ímóti er: Ongin
Blankt: Súsanna Bertholdsen
Harvið er tilmælið hjá Tekniskunevnd samtykt

**40/21**

**21/00149-2 Mýrifípan -Barnaansing í hálvari tíð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 23.04.2021 | 9/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 24/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 40/21 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 26.02.2021)**
Forkv. í sosialu nevnd ynskir at viðgerða barnaansingina í Mýrifípuna, við atlitið til um foreldur hava tørv á ½ tíð til ansing.

**Sosiala nevnd 23. april 2021:**
Kari Petersen, leiðari av Mýrifípuni var á fundinum. Sosialanevnd mælir einmælt til at bjóða ansing í ½ tíð. Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt at bjóða ansing í ½ tíð, og at hetta verður framt í samráð við stovnsleiðaran, sum eina royndartíð frá tí at skúlin byrjar eftir summarfrítíðina. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð til fíggjarætlan fyri 2022. Gjaldið fyri ansing í ½ tíð verður sett til kr./mnd. 1.000,-

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

**41/21**
**21/00078-1 Mentanartiltøk 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 02.02.2021 | 3/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 41/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 29.01.2021)**
Forkv. í Mentanarnevndini ynskir at viðgerða tiltøk, sum eru ætlaði í 2021, og er tí trivnaðarstarvsfólkið boði á fundin í mentanarnevndini 2. feb. at viðgera ætlanir fyri árið.

**Mentanarnevndin 02. februar 2021:**
Bjarni Nygaard var á fundinum og greiddi frá hvørji mentanartiltøk eru ætlað at setta á skrá fyrsta hálvár í 2021.

- *28. mai. Mentanarnátt*
- *10. Juli. Sjóranaradag*
- *24-27. juni Jóansøka*
    - *BN mælir til at ein størri ljótøknipallur verður leigaður fyri uml. kr. 35.000,-*
- *7. Aug. Bakskudløb 120. Politisatar vitja í kommununi fyri at renna "fohindringsløb"*
- *2. Okt., Heystmarknaður 2. (1. dagur)*
- *BN leggur upp til at vármarknaður verður samstundis sum umhvørvisvika er.*

Einmælt samtykt at leiga ljóðpall til Jóansøku, fyri kr. 35.000,-
Einmælt samtykt at mentanarnátt verður 28. Mai.

**Kommunustjórin 24.05.2021**
Nú fráboða verður av Landslæknanum, at Corona smittan aftur er leys í Føroyum, og tamarhald ikki er á støðuni, fer Tvøroyrar kommuna at fylgja væl við gongdini og seta í verk komandi tilmælini frá myndugleikunum.

Fyri okkum á Tvøroyri kann tað fáa óhepnar avleiðingar fyri Mentanarnáttina, sum í ringasta føri viðførir avlýsingar ella flytan av tiltøkum.

Mælt verður til at fylgja tilmælinum frá Heilsumyndugleikunum, Farsóttanevndini og Coronaráðgevingini. Og um mett neyðugt avlysa ella flyta tiltøk, har nógv fólk savnast, har í eisini Mentanarnáttina, sum er sett á skrá 28. Mai.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin tekur avgerð sambært tilmælum frá Heilsumyndugleikunum, Farsóttanevndini og Coronaráðgevingini.

**42/21**
**21/00449-1 Ung í arbeiði 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 35/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 42/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 18.05.2021)**
Mælt verður til at Tvøroyrar kommuna aftur í ár 2021 bjoðar ungum arbeiði í teirra summarfrítíð, sum byrjar fríggjadagin 18. juni og endar týsdagin 17. august. Mælt verður til, at halda fram at lata tilboðið vera galdandi fyri skúlaungdómar í Tvøroyrar Kommunu, og hvør umsøkjari fær í mesta lagi arbeiði í tvær vikur.

**Arbeiði fer fram samb. "Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2017"**
./. § 49. 1) Børn, sum ikki eru fylt 15 ár, kunnu ikki vera sett í arbeiði, sbr. tó stk. 8-9.
./. Stk. 2. 1) Tá ið ung undir 18 ár verða sett í arbeiði, skal tað í sambandi við skipan og útinnan av arbeiðinum takast atlit til aldur, menning og heilsustøðu hjá tí unga, og at tann ungi hevur møguleika at røkja sína skúlagongd.

Arbeiðið hjá Tvøroyrar kommunu er ætlað fyri ung í bólkinum 15-16 ár.
Hettar merkir, at fyri at tú kanst luttaka í Ung í arbeiði, skalt tú:

- verða fylt/ur 15 ár, áðrenn tú meldar teg til, tó
- ikki fylla 18 ár í tí árinum, tú meldar teg til
- verða sinnað/ur og tøk/ur at arbeiða í tvær vikur í tínari summafríð.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt

**Býráðið 27. maj 2021:**
Jónleyg Jespersen Bech mælir til at taka undir við tilmælinum, tó við tí broyting at bjóða ungum í aldrinum 15-17 ár arbeiði í tíðaravmarkað í 2 vikur, og at arbeiðið verður samskipað av Teknisku deild.
Alvi Mortensen mælir til at samskipandi persónur verður settur í tíðarmarkað starv í 1 viku áðrenn arbeiðið byrjar og verður í starvi ta tíð tiltakið ung í arbeiði varar.
Einmælt samtykt

**43/21**
**20/00193-7 Uppskot um marknaumskipan - Sjógøta 56 - Jóhan Nónstein**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.04.2021 | 28/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 43/21 |

**Málslýsing:**
Uppskot til marknaumskipan við gerðabýti fyriliggur og er viðheft.
Mælt verður til at fremja marknaumskipanina.

**Tekniska nevnd 19. april 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við at frama marknaðarumskipingina.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd

Til kunningar

**9/21**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 4/21 |
| 6 Býráðið | 26.04.2021 | 8/21 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 5/21 |
| 8 Býráðið | 27.05.2021 | 9/21 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 01.03.2021**
- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunna.

**Kommunustjórin 20.04.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-mars)

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 26. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Kommunustjórin 15.05.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-apr)

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**10/21**
**21/00329-5 Kunning -skriv frá kommunufelagnum til UVMR um val av stýrislimi til BHS**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.05.2021 | 10/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 06.04.2021)**
Umsitingin hevur hin 25.03.2021, móttikið avrit av skrivi frá Kommunufelagnum, sum er sent il landstýrismannin í UVMR, viðv. kæru um valið av styrsilimi í Bú- og heimatænastuna í Suðuroy, BHS.

Skrivi frá kommunufelagnum er ein áheitan á landstýrismannin, ið varðar av UVMR – kommunalaeftirlitið- um at taka fráboðanina aftur um at ógilda valið hjá Tvøroyrar kommunu av limi í stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy BHS.

> "*Kommunufelagið vil tí mæla til, at landsstýrismaðurin tekur fráboðan sína um at ógilda valið hjá Tvøroyrar kommunu aftur og í staðin skjótast møguligt fær staðfest í Løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hvussu veljast skal í samstørvunum fyri kommunalu eldraøkini*"

Skrivi frá Kommunufelagnum er svar skriv til landstýrismannin í UVMR, sum hevur viðgjørt klagu um valið av stýrislimum í BHS, har kommunalaeftirlitið mælir til:

> "*Valið av føstum limi og 1. Og 2. Varalimi í stýrið fyri BHS verður sbrt. Kommunustýrislógini §55, stk. 1, ógildað. Tvøroyrar kommuna verður biðin um at velja hesi umboðini av nýggjum eftir lutfalsvalháttinum.*

Umsitingin mælir til at bíða eftir svari frá UVMR, áðrenn málið verður viðgjørt aftur.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**11/21**
**21/00413-2 Ymisk kunning til býráði**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.05.2021 | 11/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**

**Kunning til Býráðið**

- Maritimt stuðulspunkt í Norðuratlandshavinum
- Skriv til landstýriskvinnuna í Almennamálum –um Barnabústovn

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Eyð Eidesgaard

Súsanna Bertholdsen